# Angela flott nummar tvey í norðurlendskari kapping

**Angela Petersen hevur við barnasendingini Fres fingið heiðurin sum næstbesta barnasending í Norðurlondum í harðari kapping, har summar sendingar kosta milliónir at framleiða. Angela er longu boðin til aðrar kappingar og hevur fingið nógvar áheitanir og sambond og hon sigur seg sjálvsagt vera »til Fres«, ja, enn er heiðurin ikki heilt gingin upp fyri henni**

HEIÐURSPLÁSS
*Dagfinn Olsen*

Í vikuskiftinum var kappingin Nordisk Barne TV Festival 2003 hildin á Europeiska Filmháskúlanum í Ebeltoft í Danamrk.

Mánadagin kom Angela Petersen heim við heiðursbrævið, tí mótvegis øllum vónum, so gjørdust hon og sendingin Fres nummar tvey í bólkinum, sum snúði seg um sendingar til børn millum 3 og 7 ár.

Tiltakið er altjóða samtak, har serkøn sjónvarpsfólk og fakfólk hittast at gera av, hvør eigur heiður fyri gott tilfar, ið er framleitt til børn. Og kappingin er ikki bert nakað hissini, tað skilir ein við at fáa at luttøkutreytirnar at vita. Tað kostar 25.000 kr. bert at senda inn og aðrar 5.000 kr. at taka lut, umframt uppihald og annað. Á fyrsta plássinum í sama bólki sum Fres lá ein finnlandssvensk framleiðsla.

– Eg fangaði tað als ikki og eri enn í totalum sjokki, sigur Angela.

– Fólk hava nýtt milliónir at framleiða sendingar og tilfar. Fres kostar lítið og einki at gera og eg fái ikki nógv fyri tað, sigur Angela, sum saman við Bjarna Rubeksen fremleiðir og eigur heiðurin av sendingini, sum er næstbest í Norðurlondum.



– Hetta er avgjørt bíligasta sending av sínum slag, hon var ikki eingang tekstað, til kappingina, sigur Angela, sum fekk stuðul at fara við til kappingina frá nevndum handan kappingina.

– Eg væntaði ikki so nógv, helt at sendingin skuldi bara vísast, men so vísti tað seg, at hon var við. Ein fær kritikk, verður róstur ella pilkaður niður. Ein frá BBC, sum m.a. hevur gjørt kendu sendingina Blue Peter, gav mær kritikk og var sera positivur.

– Hetta var veruliga nakað við børnum, ið ein sat eftir við, tá ein hevði sæð sendingina, mótvegis nógvum øðrum yvirframleiddum, sum datt sundur á vegnum, segði hann. Her var nakað ektað og einfalt, greiður Angela frá.

Hon hevur fingið góðan kritikk og nógv hava vent sær til hennara, t.d. við spurningum um Føroyar. Nógv sambond eru knýtt og hon er longu boðin til líknandi kapping í München komandi ár. Eisini er greitt, at hon fær fleiri vitjanir, t.d. úr Finnlandi.

## »Til Fres«

– Enn veit eg ikki heilt, hvat eg skal gera við heiðurin, sigur Angela og minnur á, at Bjarni Rubeksen, tøkningur, avgjørt eigur sín stóra lut í heiðurinum.

Ein kann kanska siga, at tú ert »til Fres«?

– Ja, so avgjørt, lær Angela, men enn eri eg ikki heilt komin yvir skelkin. Eg havi nógv jørn í eldinum og tað er stuttligt at slíkt kann henda. Tað plagar bara altíð at henda fyri onkran annan, ikki meg, sigur Angela, sum leggur afturat, at hon væntar hvørja løtu at vakna og uppdaga, at hetta er ein dreymur.

– Eg eri vorðin leiðari fyri Frítíðarskúlan í Hoyvík og fari fyrst at fáa øll væl heim í summarfrí. So kann eg hugsa um hvat eg skal nýta hetta til og hvat hetta kann føra við sær, sigur Angela, sum mánadagin kom afur til Føroya og til fult hús av fólki.

Til ber at frætta meira um Norðurlendsku barnasjónvarpskappingina á www.nbf2003.com

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, Seinnapartin regn ella mjørki og hann melur av ymsum ættum. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi, og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 9 og 13 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 6 |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | 4 |
| Halifax | 14 |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 25 |
| Tromsø | 13 |
| Bergen | 15 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 15 |
| Keypmannah. | 16 |
| Helsinki | 13 |
| Moskva | 15 |
| Berlin | 19 |
| Warzawa | 15 |
| Kiev | 17 |
| Bukarest | 23 |
| Paris | 25 |
| Madrid | 28 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 33 |
| Athen | – |
| Malta | 32 |
| Tunis | 34 |
| Beijing | 31 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 16 |
| New York | 20 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | – |
| La Paz | – |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 18 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 991 hPa. í útsynning úr Íslandi fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið haðani til Føroya fer í landnyrðing.




Lágtrýstið í útsynning úr Føroyum fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikukvøldið.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 16/06 kl. 06⁰⁰– 17/06 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,3°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 16,0 mm – mált frá 16/06 kl. 06⁰⁰–17/06 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juni: 60,9 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

12. juni: Mánin næstur jørðini
14. juni: Fullmáni
21. juni: Seinna kvarter
25. juni: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 18. juni | 10.58 | 23.23 | 09.58 | 22.23 | 10.13 | 22.38 | 00.31 | 12.58 | 01.31 | 13.58 | 09.13 | 21.38 | 08.13 | 20.38 | 11.13 | 23.38 | — | 12.13 | 10.43 | 23.08 | 11.58 | — |
| 19. juni | 11.49 | — | 10.49 | 23.10 | 11.04 | 23.25 | 01.23 | 13.49 | 02.23 | 14.49 | 10.04 | 22.25 | 09.04 | 21.25 | — | 12.04 | 00.38 | 13.04 | 11.34 | 23.55 | 00.23 | 12.49 |
| 20. juni | 00.10 | 12.31 | 11.31 | — | 11.46 | — | 02.10 | 14.31 | 03.10 | 15.31 | 10.46 | 23.20 | 09.46 | 22.20 | 00.25 | 12.46 | 01.25 | 13.46 | — | 12.16 | 01.10 | 13.31 |
| 21. juni | 01.05 | 13.40 | 00.05 | 12.40 | 00.20 | 12.55 | 03.05 | 15.40 | 04.05 | 16.40 | 11.55 | — | 10.55 | 23.28 | 01.20 | 13.55 | 02.20 | 14.55 | 00.50 | 13.25 | 02.05 | 14.40 |

5 707265 100036 >